# Kvinnurnar klárar til hálvfinalurnar

**Finalistarnir í fjør, KÍ og HB, vunnu sannførandi sínar fjórðingsfinalur**

FSF-STEYPIÐ
*Páll Holm Johannesen*



*Finalistarnir í fjør, HB og KÍ, vunnu sannførandi sínar fjórðingsfinalur um vikuskiftið. Við lutakastinum til hálvfinalurnar er møguleiki fyri eini endurtøku av steypafinaluni í fjør millum KÍ og HB.*
*MYND: Savnsmynd*

Kvinnurnar hava tvey tey undanfarnu vikuskiftini leikt ávíkavist áttandaparts- og fjórðingsfinalurnar, og nú er greitt hvørji feløg bresta saman í hálvfinalunum. Greipuvinnararnir úr KÍ møta B36, meðan HB og AB bresta saman í hinari hálvfinaluni.

Fleiri feløg hava longu tikið seg úr kappingini, og tað hevur eisini sett sín dám á steypakappingina hjá kvinnunum higartil. Bert tvær fjórðingsfinalur vórðu leiktar um vikuskifti, tí í hinum báðum dystunum hava feløgini tikið úr kappingini.

Finalistarnir í fjør, KÍ og HB, vunnu bæði sannførandi á ávíkavist B68 og GÍ. AB og B36 komu víðari til hálvfinalurnar uttan at leika, tí VB og Skála seta seg ikki fyri at manna lið til kappingina hjá kvinnunum í ár.

Eftir lutakastið til hálvfinalurnar er greitt, sæst at møguleiki er fyri eini endurtøku av steypafinaluni í fjør millum KÍ og HB. Hesi feløg hava spælt steypafinalu síðan 1999, og vinna tey hálvfinalurnar, so verður tað fimta árið á rað, at steypafinalan stendur millum KÍ og HB

### Leggja til brots um vikuskiftið

Nú verður steðgur í steypakappingini hjá kvinnum til miðskeiðis í mei-mánað. Um vikuskiftið verður farið undir landskappingina. Landskappingin hjá kvinnum verður í ár skipað sum ein deild við tíggju feløgum. Dystirnir í 1.umfari eru Sumba-EB/S, KÍ - FS Vágar, B36-HB, AB-B68 og GÍ-B71.

### Fjórðingsfinalurnar í tølum:

KÍ-B68 7-1 (2-0)
KÌ: Rannvá Andreasen 2, Bára S. Klakkstein 2, Malena Josephsen, Vivian Bjartalíð, Maria við Neyst
B68: ?

Skála-B36 Skála tikið seg úr kappingini

AB-VB VB tikið seg úr kappingini

**HB-GÍ 9-1**
HB: Gunn Müller 2, Halltóra Joensen 2, Eyðfríð Kristiansen 2, Vivian Unadóttir, Malan á Dunga, Randi Wardum
Gí: Heidi Heinesen

**Málskjúttar í Steypakappingini:**

Halltóra Joensen HB 5 mál
Eyðfríð Kristiansen HB 3 mál
Gunn Muller HB 3 mál
Rannvá Andreasen KÌ 2 mál
Bára S. Klakkstein KÍ 2 mál
Heidi Heinesen GÍ 2 mál

# Heðin og Jóannes vunnu FM fyri pør

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Leygardagin 5. apríl var finalan um føroyameistaraheitið fyri pør í bridge leikt í Bridgehúsinum í Tórshavn. Kappingin var skipað sum ein barometurkapping, leikt vóru 19 umfør á 4 spøl, tilsamans 76 spøl. Byrjað var at spæla kl 10:00 og ikki var liðugt fyrr enn kl 21:30. Kappingin er sera drúgv og skiftust fleiri pør um at hava oddasessin.

Tá ið kappingin var hálvrunnin, sá tað út til, at vinnararnir frá í fjør, Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen fóru at vinna aftur, men skjótt vísti tað seg, at Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen fóru at blanda seg. Við góðum spæli fóru teir eisini frá hinum pørunum og vunnu sannførandi. Liðfelagarnir hjá Jóannes og Heðin, Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr, góvu teimum ta drúgvastu mótstøðuna, sjálvt um teir gjørdist ov stuttir.

Hetta spælið er frá umfarinum millum Boga Simonsen og Róa á Rógvu Joensen móti Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen, sum teir síðst nevndu vunnu tepurt. Í hesum spælinum fingu føroyameistararnir ein deildan botn.

Kortfordeilingin er:
Gevari: Suður/EV

Norður:
Sp: D76
Hj: 63
Rú: D752
Kl: E1042

Vestur:
Sp: B93
Hj: D82
Rú: E1084
Kl: 983

Eystur:
Sp: K1052
Hj: 1054
Rú: 963
Kl: K75

Suður
Sp: E84
Hj: EKB97
Rú: KB
Kl: DB6

Meldingarnar eru:

| Jóannes | Rói | Heðin | Bogi |
|---|---|---|---|
| S. | V. | N. | Ey. |
| 1hj | pass | 1ut | pass |
| 3ut | pass | pass | pass |

Útspæl sp 5 (3. ella 5. hægst)

Útspælið gekk via sp 4 og bónda til frúgv. Heðin spældi nú ein lítlan rútara til bóndan, sum átti stikkið, tað sama gjørdi rútar kongur!! Nú spældi Heðin kleyvara frúgv frá borðinum, Rói legði kl 9, og eg fall frá. Kleyvara bóndi varð síðani spældur, og átti hann eisini stikk. Nú kundi Heðin vunnið við at spælt kleyvara ess, men hann valdi heilt nátúrligt at knípa Róa fyri kleyvar kong, men tá ið hesin sat hjá eystan, endaði Heðin við at fara ein niður, tí hann ikki slapp heim til kleyvar ess, hetta kostaði Heðin -7 á barometrinum.

Endaliga støðan í FM finaluni fyri pør, 10 tey fremstu pørini av 20. Miðal er 0:

1. Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen
143
2. Dánjal Pauli Mohr - Per Kallsberg
122
3. Hans Jacob Petersen - Arnbjørn Sivertsen
44
4. Atli Hansen - Jógvan Ranghamar
43
5. Helgi Joensen - Eyðun Joensen
38
6. Símin Lassaberg - Eyðun Anthoniussen
37
7. Petur Annfinn Johannesen - Eilif Petersen
21
8. Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen
18
9. Árni Dam - Marner Joensen
13
10. Fríðhild Petersen - Jákup Hjaltalin
6



*Vinnararnir í FM fyri pør: f.h. Heðin Mouritsen og Jóannes Mouritsen*



# Kristian Suni Høgnesen endurvann Føroyameistaraheitið fyri einstaklingar í billiard

*Kristian Suni Jacobsen vann annað árið upp í slag FM-heitið fyri einstaklingar í billiard. Saman við Klaksvíkar Klubba vann Kristian Suni eisini FM-heitið fyri lið í ár, so ikki kann sigast annað, enn at kappingarárið í ár hjá Kristiani Suna hevur verið sera væl eydnað*



BILLIARD
*Tíðindaskriv*

Um vikuskifti var einstaklingakappingin í billiard avgreidd á Tvøroyri. Vinnarin gjørdist tann sami sum í fjør - navniliga Kristian Suni Høgnesen úr Klaksvíkar Klubba. Við sínum róliga og brillierandi spæli dró hann longsta strái.

Í finaluni vann hann sikkurt á Max Rasmussen úr Tvøroyrar Billiardfelag. Dysturin gjørdist ongantíð spennandi. Kristian Suni byrjaði væl og sum dysturin leið gjørdist munurin alt størri og størri. Við góðum serium og tolni fekk Kristian Suni 710 eygu. Hetta man sigast at vera sera flott. Max fekk ongantíð sítt annars sera góða spæl ígongd. Hepni, sum skal til, var ikki við honum hendan dystin. Í kvartfinalubólkinum hevði Max annars kvøldið fyri vunnið á Kristian Suna við heili 772 eygum móti 586 í einum sera drúgvum dysti.

Dystin um 3. plássi varð leiktur millum Bjarna Skaalum úr Kagganum og Ólavur Kjølbro úr Klaksvíkar Klubba. Dysturin byrjaði javnur. Munurin var ikki stórur í fyrra hálveiki. Í seinna hálvleiki fór Ólavur eitt sindur framum. Bjarni, sum annars er kendur fyri sínar stóru seriur, megnaði ikki at fáa nakra góða seriu í hesum dystinum. Ólavur økti síðani um munin og vann tískil dystin og harvið bronsuna.

Jan Muller úr Kagganum, Niels Nielsen og Carsten Hansen úr Havnar Klubba og Jens Pauli Poulsen úr Tvøroyrar Billiardfelag, sum eisini høvdu kvalifiserað seg til kvartfinalubólkarnar, vóru ov stuttir hesuferð at náa hálvfinalunum. Tað vóru teir somu fýra, sum kvalifiseraðu seg í ár sum í fjør til hálvfinalurnar.

Klaksvíkingar hava annars vunnið alt, sum er at vinna, í ár. Ólavur vann Haldor Holm Cup kappingina í oktober, liðkappingina í 1. og 3. deild vann Klaksvíkar Klubbi, Kristian Suni vann sum kunnugt kappingina fyri einstaklingar og steypið fyri hægstu seriu vann mín sann eisini Kristian Suni við 224 eygum.

# Enn eingin nýggjur dato fastsettur

HSF AÐALFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*

Hondbóltssamband Føroya skuldi eftir ætlan havt aðalfund seinasta vikuskiftið, men fundurin varð avlýstur. Formaðurin í HSF, Petur Ove Petersen, sigur, at enn er ongin nýggjur dato fastsettur.

Viðtøkan sigur, at aðalfundurin skal vera í apríl mánaði, men hetta verður torført, sigur Petur Ove við Sosialin.

- Um vikuskiftið verður endabrakið hjá teimum eldru, so tá liggur ikki fyri og nú eru páskirnar í nánd, so tað verður torført at aðalfundin avgreiddan í apríl mánað, og tí er mest sannlíkt, at fundurin verður hildin í mei, greiðir formaðurin í HSF frá.

# Claus Bech Jørgensen sett met í Onglandi

Í farnu viku høvdu vit eina samrøða við hálva føroyingin, Claus Bech Jørgensen, sum spælir í enska 1. deildarfelagnum Bradford. Tað hevur gingið rættiliga væl hjá hálva føroyinginum í Bradford í ár, og Bradford leikarin er í løtuni mest skorandi danski leikarin uttanfyri Danmark.

Ikki nokk við tí, hann hevur í løtuni eisini eitt met í enskum fótbólti. Claus Bech Jørgensen hevur stotið mál í átta teimum síðstu útidystunum hjá Bradford, og tað hevur ongin gjørt undan honum í enskum fótbólti. 26 apríl leikar Bradford aftur útidyst, og tá hevur Claus Bech Jørgensen møguleika at betra um metið hjá sær.

**-páll**

# Maratondystur og loppumarknaður í fimleikarhøllini

TÍÐINDABRÆV FRÁ MJØLNIR

Peningurin frá tiltakinum fer til útreiðslur í samband við, at gentir og dreingir 14 ár hjá MJØLNIR fara at luttaka í altjóða kapping í Ubberud í Odense í døgunum 1.- 6. maj 2003.03.26

Seinastu tíðina hava hesi ungu verið runt í býnum hjá fyritøkum og privatum við stuðulsbrøvum til maratondyst, fyri á hendan hátt at fáa pening til vega, sum kann fíggja eina tílíka danmarkarferð.

Samstundis sum maraton dysturin byrjar kl. 10, verður loppumarknaður og kaffisøla í hinari fimleikarhøllini, sum foreldrabólkurin skipar fyri.

So, um tú ruddar kjallaran, skápið ella loftið, eru vit áhugaði í at móttaka: jakkar, frakkar, húgvur, hattar, taskur, leikur og prýðislutir/búnýtir

Meiri fæst at vita við at venda sær til Sigrun tel. 75 73 84 ella Merry 45 66 89.